## Berlusconi mist ógegnið

Grundlógardómstólurin í Italia ógildaði í gjár lógina, sum vardi Silvio Berlusconi, forsætisráðharra og aðrar leiðandi politikarar ímóti rættarsókn. Lógin kom í gildi nakar fáar vikur eftir, at Berlusconi gjørdist forsætisráðharri í fjør, og endamálið var at verja forsætisráðharran, forsetan og formenninar í teimum báðum tingdeildunum ímóti rættarsókn. Avgerðin hjá dómstólinum ber í sær, at ákæruvaldið kann stevna Silvio Berlusconi í einum máli, har hann er skuldsettur fyri at hava goldið einum fyrrverandi sakførara tríggjar milliónir krónur fyri at bera falskan vitnisburð í tveimum rættarmálum í nítiárunum.



## Elbilurin dýrari

Tað kostar einar 300 krónur meiri enn mánaðin hjá einum dana at koyra í einum elbili enn einum bensinbili, sjálvt um bensinprísurin liggur um níggju krónur, og sjálvt um einki avgjald er á elbilum. Lærke Flader í Dansk Energi sigur við danska kringvarpið, at í samanberingini hevur hann brúkt tveir bilar av slagnum Citröen C1. Teir vóru líka burtursæð frá, at annar brúkti bensin og hin elorku. Niðurstøðan var, at aftan á fimm ár var elbilurin 300 krónur dýrari um mánaðin enn bensinbilurin.

# Hava ikki ráð at kanna um bankar taka ov høga rentu

**Fyrr í ár fór Kappingareftirlitið at kanna kappingarviðurkiftini í føroyska fíggjarheiminum, men tey máttu gevast, tí tey høvdu ikki ráð til at gera kanningina lidna**

KAPPINGAREFTIRLIT

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Kappingarráðið hevur ikki ráð til at kanna um rentan hjá bankunum er ov høg. Vit hava heldur ikki ráð til at gera aðrar kanningar, sum vit halda, at tað hevði verið rætt at gjørt, sigur Terje Sigurðsson, deildarleiðari á Kappingarráðnum*

Er rentan, sum føroysku bankarnir krevja fyri at læna pening út, ov høg?

Er nøkur verulig kapping ímillum bankarnar, soleiðis sum teir sjálvir so staðiliga tvíhalda um, at tað er?

Alt hetta, og breiðsíðuna frá landsstýrismanninum í vinnumálum, sum er nevnd í hinari greinini, kundu vit havt fingið svar upp á.

Fyrr í ár fór Kappingareftirlitið nevniliga undir at kanna kappingarviðurskiftini í føroyska fíggjarheiminum.

Men Terje Sigurðsson, deildarleiðari í Kappingarráðnum, sigur, at tey máttu gevast, tí játtanin til stovnin er uppi og tey høvdu ikki ráð til at gera kanningina lidna.

### Skert inn á bein

Terje Sigurðsson sigur, at tað var orsakað av sparingum, at Kappingarráðið noyddust at leggja kanningina á hyllina.

- Játtanin á fíggjarlógini til stovnin varð skerd so nógv, at vit máttu leggja alt virksemi á hyllina uttan akkurát tað mest átrokandi, sum tað beinleiðis er ásett í lógini, at vit skulu gera.

Hann sigur, at tá ið lógin varð broytt í 2008, komu Kappingarráðið og Vinnumálaráðið til ta niðurstøðu, at skuldi Ráðið klára at umsita øll hesi krøvini forsvarliga, skuldu minst fimm fólk veru í starvi í Kappingarráðnum

- Tá ið fíggjarlógin fyri 2008 varð løgd fram, varð lagt upp fyri hesum og tí vórðu góðar 2,7 milliónir settar av til Kappingarráðið.

Men løgtingsval hevði verið, so fíggjarlógin kom ikki í gildi fyrrenn mitt í árinum og tað eydnaðist ikki at seta størvini.

Og tá ið fíggjarlógin fyri í ár kom stutt eftir, var ein heil millión skarvað av, so at vit fingu ikki meiri enn 1,7 millión.

### Onki fólk at gera kanningar

Terje Sigurðsson sigur, at Kappingarráðið mátti sjálvsagt laga virksemi til tann fíggjarliga veruleikan og tí mátti bæði bankakanningin og nógvar aðrar kanningar, leggjast á hyllina.

- Í dag er støðan tann, at játtanin fyri í ár er uppi. Sostatt er onki fólk til at gera hesa bankakanningina og nógvar aðrar kanningar, sum vit halda, at vit áttu at farið undir.

Deildarleiðarin sigur, at sum støðan er nú, fær Kappingarráðið at kalla onki gjørt uttan tað allarmest neyðuga, sum lógin beinleiðis áleggur ráðnum at gera.

Sostatt vísir tað seg, at fyri so vítt segði Johan Dahl satt, tá ið hann í Løgtinginum í gjár segði, at Kappingarráðið var farið í holt við at kanna bankarnar, soleiðis sum greitt er frá í hinari greinini her á síðuni.

Men veruleikin er, at vit fóru undir eina slíka kanning, men hava ikki havt ráð til at gera hana lidna og tí er hon løgd á hyllina.

### Amputeraður kappingarmyndugleiki

Her skal leggjast afturat, at tað er júst Johan Dahl, sum umsitur kappingarráðið.

Næsta ár hevur landsstýrið skotið upp at seta 1,9 millión til Kappingarráðið.

Fyri tað játtina kann Kappingarráðið hava trý fólk í starvi.

- Men tað kunnu vit eisini gera nakað av nyttu, sigur Terje Sigurðsson.

Hinvegin sigur hann, at tað, sum er lagt upp til, er ein amputeraðu kappingarmyndugleiki.

Hann vísir eisini á, at Kappingareftirlitið í Grønlandi hevur eina játtan upp á 10 milliónir og tað hendir ongastaðni í londunum rundan um okkum, at kappingareftirlitini verða skerd, heldur er gongdin tann, at tey verða styrkt, tí tað verður mett, at slíkt eftirlit hevur rættiliga stóran týdning.

Johan Dahl staðfestir í stuttari viðmerking, at støðan er ikki nøktandi, men at hann í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fer at royna at hækka játtanina til Kappingarráðið.

# Bankarnir mergsúgva vinnulívið

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum skjýtur rættiliga við skørpum eftir føroysku bankunum, tí hann heldur, at teir taka ov høga rentu**

RENTUSTØÐIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Føroyska vinnan doyr, tí bankarnir mergsúgva hana við teirri høgu rentuni, sum teir taka fyri at læna pening út.

Sjáldan hava skotini ímóti føroysku peningstovnum verið skarpari enn tey, sum sjálvur landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl, skeyt eftir teimum í Løgtinginum í gjár.

Johan dahl ásannaði annars, at hetta er ikki eitt málsøki, hann umsitur í landsstýrinum.

Men hann helt kortini, at sum landssýrismaður í vinnumálum hevur hann ábyrgd fyri teimum karmum, sum vinnan hevur at arbeiða undir og her roknar hann eisini fíggingarmøguleikarnar upp í.

- Tað er mín uppgáva at átala, at rentustøðið í Føroyum er ov høgt aftur ímóti rentustøðinum í okkara grannalondum, sum vit kappast við.

- Onki samfelag kann liva við tí, sum tað føroyska samfelagi í løtuni er útsett fyri, tá ið tað kemur til rentur í mun til okkara grannar.

- Vinnan doyr, mann simpulthen mergsýgur hana við tí rentu, sum er í løtuni í mun til okkara grannar og eg vóni tað, at bankarnir hoyra tað og taka tað til sín og royna at uppføra seg "anstendugt", sum hann tók í eini rættiligari breiðsíðu ímóti bankunum í tinginum í gjár.

Hann helt eisini, at hetta er ein uppgáva hjá okkara Kappingarráðið at hyggja upp á

- Og eg veit, at teir arbeiða við onkrum í løtuni, legði Johan Dahl afturat.

Hvørja ferð, søkt hevur verið at bankanum fyri at hava ov høga rentur, hava teir vart seg við, at tað er blivið dýrari at reka banka og at peningur, sum teir sjálvur læna, eitt nú í bankapakkanum, hevur dýrari rentu og tí noyðast teir at seta teirra egnu rentu samvarandi.

Men sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, vóru alt hetta spurningar, sum vit kundu fingið greiði á, tí fyrr í ár fór Kappingarráðið undir at kanna bankarnar, men ráðið mátti gevast, tí tey høvdu ikki ráð til at gera kanningina lidna.